## Rógvi styrkir HB-verjuna

Rógvi Holm, sum er av Argjum, hevur seinnu árini verið knýttur at skotska Aberdeen, og fleiri ferðir í heyst var hann partur av fyrstaliðshópinum har, uttan at talan tó gjørdist um spælitíð í skotsku Premier League. Her heima hevur 19-ára gamli spælarin gjørt mest vart við seg sum ein týðandi partur av framúr góðu úrslitunum hjá føroyska U21-landsliðnum, og fleiri ferðir hevur verið nevnt, at hann longu nú er búgvin at toga upp í A-landsliðshópin. Við Rás2 segði Rógvi í gjár, at hann hevur vónir um at menna seg sum spælara í HB, og at hann sjálvandi vónar, at hann við hesum kemur til eitt felag, sum roynir at halda seg á ovastu rók, har HB eisini endaði árið í fjør.



## Klaksvíkingar í Eysturoynna

KÍ missir nú enn tveir av spælarum sínum. Síðani niðurflytingina hava mest sum allir teir størstu profilarnir á liðnum leitað sær til onnur feløg, og nú er greitt, at tveir úr yngra endanum eisini fara gjøgnum undirsjóvartunnilin hetta kappingarárið. Eli Simonsen hevur nevnliga tikið av møguleikanum at spæla Vodafone-bólt á Toftum, meðan Oddmar á Lakjuni fer í fótasporunum hjá eldra beiggjanum, Heðini, og skal spæla við NSÍ í summar.

# Símun Samuelsen til HB

**24 ára gamli landsliðs-spælarin, sum fyri stuttum gavst í Íslandi, hevur nú skrivað undir avtalu við HB**



jakup@sosialurin.fo

Jákup Mørk

Tað skrivar HB á heimasíðu sínari, og eingin ivi er um, at við hesi tilgongdini hevur HB fingið ein tann størsta profilin í føroyskum fótbólti í hópin. Símun, sum er uppaldur í VB, hevur síðani 2005 havt sáttmála við íslendska Keflavík, umframt at hann í hálvt ár var útleiðagur til norska Notodden.

Seinnu árini hevur hann verið fastur partur av føroyska landsliðshópinum, og her tykist hann veruliga hava fingið sítt gjøgnumbrot, síðani Brian Kerr tók yvir. Sáttmálin millum HB og Símun Samuelsen er galdandi í trý ár.

**Valið stóð millum meistararnar úr HB og uppflytararnar í barndómsfelagnum. Og nú er so greitt, at tað verður í Havn, at Símun skal royna seg komandi trý árini**




## VÍF skal prógva seg

**Eftir venjaraskiftið tykist tað av álvara at vera sannleikans tími, tá VÍF vitjar hjá Neistanum sunnudagin**



jakup@sosialurin.fo

Jákup Mørk

Vegirnir hjá Jónleifi Sólsker og VÍF skiltust, eftir at VÍF fyri tveimum vikum síðani fekk av at vita frá grannunum í Kollafirði.

Sum støðan er á stigatalvuni, so er neyvan ráðiligt hjá VÍF at missa serliga nógv stig afturat, um teir vilja vinna seg av botnsessinum, og í so máta kann tað verða tað sama, um mótstøðan eitur Neistin ella nakað annað. Og so mugu teir í VÍF bara vóna, at tað kann bera ein fyrimun við sær, at Neistin seinasta vikuskiftið vann steypakappingina.

Á Skála hevur StÍF víst framstig seinastu dystirnar, og nú Kyndil vitjar, skulu strandingarnir av sonnum prógva, at teir eisini eru førir fyri at fáa tvey stig fyri ómakin. Nakað sum teir ikki hava royn seinastu tríggjar mánaðirnar.

Triði dysturin hetta vikuskiftið verður í Kollafirði, har KÍF og H71 dystast í einum dysti, sum væl kann verða avgerandi í kapprenningini um finaluplássið.

# VB-spælari má velja

**Meðan aðrir dystir eru fluttir vegna donsku U18-vitjanina, noyðast Tjaldur og VB at spæla sunnudagin. Og tað hevur sett Unu Egilsdóttir í sera trupla støðu**

Klokkan 13.30 skal føroyska U21-landsliðið nevnliga spæla í Vestmanna móti donsku U18-europameistarunum. Una er partur av føroyska U21-hópinum, og upplivingin móti donsku europameistarunum er av tí slagnum, sum flestøll við tilknýti til hondbóltin ynskja at royna.

Hinvegin er Una eisini partur av VB-liðnum, sum stríðist fyri lívinum í Sunset-deildini. Kanska eru útlitini til stig ikki tey bestu, tá liðið skal spæla á útivølli móti føroyameistarunum úr Tjaldri. Men talan er um dysti, sum krevur í misnta lagi eitt fullmannað VB-lið, og talan er eisini um dyst, sum Una fyri alt í verðini vil sleppa at spæla.

Sum skilst hevur VB til fánýtis biðið bæði HSF og Tjaldur um at flyta dystin, men tað hevur á ongan hátt borið til. Og helst verður loysnin, at Una byrjar dagin við at ferðast til Vestmanna, fyri síðani at ferðast til Runavíkar, tá landsdysturin er hálvrunnin. Neyvan tað, sum kann kallast fyri optimal fyrireiking hjá nøkrum spælara yvirhøvur.

**-mørk**

## Dystir um vikuskiftið

### Flogbóltur

**Steypafinala, kvinnur**

20.02 13.30 SÍ-Dráttur

**Steypafinala, menn**

20.02 15.30 Mjølnir-SÍ

### Hondbóltur

**Sunset-kappingin**

21.02 15.00 Tjaldur-VB

**Atlantic Airways-kappingin**

21.02 16.00 Neistin-VÍF
21.02 16.00 StÍF-Kyndil
21.02 16.00 KÍF-H71

**Venjingardystir, kvinnur**

20.02 16.00 FO-DK U18
21.02 13.30 FO U21-DK U18
22.02 19.00 Stjørnan-DK U21